Lisa 20 ár:

# Hugnakvøld í Listaskálanum

HUGNAKVØLD
*Lisa*

Í kvøld, fríggjakvøldið kl 19, verður tað næsta tvørlistarliga hugnakvøldið, í Listaskálanum, í samband við, at Listafólkasamband Føroya varð stovnað

Kristian Blak fer at spæla pumpuorgul, meðan Oddfríður M. Rasmussen lesur upp.

Síðani verður Videomyndarøðin, »Út í verð við Taxi«, eftir Inga Joensen, víst.

Andrias Reinert og Bo Isholm framføra tónleik úr nýggja filminum um Jens Paula Heinesen, ið Gulla Øregaard arbeiðir við.

Kvøldið endar við, at Unn Patursson-Band við tónleikarunum Rógva á Rógvu, Halli Johannesen og Búa Dam spæla. Øll eru hjartaliga vælkomin, heilsar Listafólkasamband Føroya.

# 1200 fólk hava runnið fyri vívinum

SJÓNLEIKUR
*Tíðindaskriv*

Fleiri enn eitt túsund áskoðarar hava nú verið í Sjónleikarhúsinum til skemtileikin ”Renn fyri vívinum”. Og sigast má, at væl hava áskoðarnir tikið móti leikinum, summi hava havt ilt í búkinum av berum látri, tá tey eru komin út aftur.

Havnar Sjónleikarflag og Spírar vilja takka øllum, sum hava verið til leikin, men ein serlig tøkk til tey, sum vóru sunnukvøldið 10. mars. Sum øllum kunnugt, fór ljósið um stóran part av landinum hetta kvøldið. Tá bert eitt korter var eftir av leikinum, gjørdist eisini myrkt í Sjónleikarhúsinum, so leikurin mátti avbrótast. Hóast eingin visti nær streymurin kom aftur, valdu næstan øll at bíða. Hóast myrkrið og óvissuna sótu áskoðarnir trúgvir í ein heilan tíma og bíðaðu eftir endanum. Ljósið kom tó at enda aftur og leikararnir fingu spælt henda skemtiliga leikin at enda.

Havnar Sjónleikarfelag og Spírar fara nú undir tær seinastu sýningarnar í Havn. Skráin sær soleiðis út:

Hósdagin kl. 20.00
Fríggjadagin kl. 20.00
Leygardagin kl. 17.00
Sunnudagin kl. 17.00

Vor kære mor, svigermor, mormor,
farmor og oldemor

**Tove Helene Mommer**
(født Prener)

f. 14. januar 1926
er stille sovet ind d. 12. marts 2002

***...vær brændende i ånden! Tjen Herren!***
***Rom. 12.11***

**Benedicte, Ole, Per, Gene, Lone, Mette**
**Rebecca, Andreas, Isabel, Katrine**
**Christian, Annmarie, Lucas**

Begravelsen finder sted mandag 18. marts kl. 14[00]
fra Københavns Kristne KulturCenter, Drejervej 15,
2400 København NV

*Í annaðkvøld hevur Fuglafjarðar Sangkór konsert í Fulgafjarðar kirkju í samband við, at kórið hevur sjeyti ár á baki*



# Várlig sjeytiára fagnaðarkonsert og uttanlandsferð

UTTANLANDSFERÐ
*Fuglafjarðar Sangkór*

Í annaðkvøld, leygarkvøldið kl 20, hevur Fuglafjarðar sangkór kirkjukonsert í Fuglafjarðar kirkju. Hetta er í samband við at, Fuglafjarðar sangfelag hevur sjeyti ár á baki, men sigast kann, at kórið hevur røtur aftur til 1925.

Fuglafjarðar sangkór fer um páskirnar á eina uttanlandsferð og liggur leiðin fyrst til Aalborg, sum er vinarbýur Fuglafjarðar.

Skírishósdag, 28. mars kl 19, hevur sangkórið konsert í Skalborgskirkju í Aalborg, langafríggjadag, 29. mars kl. 19, konsert í Vodskov kirkju, páskadag 31. mars kl. 16, konsert í Skagens kirkju, 2. páskadag 1. apríl, fer kórið til Svøríkis og hevur konsert í Frølunda kyrka, Kyrkgatan 2, kl 16 í Gøteborg. Kórið fer at vitja Henning Bøgesvang fyrrverandi prest í Klaksvík.

Kórið hevur tvær konsertir í Lund. Týsdagin 2. apríl syngur kórið í sankt Hans Kyrkan, Fräladen, mikudagin 3. apríl hevur kórið konsert í Vita huset, Urdaväden. Kórið vitjar Midnatskøren og leiðara tess, Gøsta Petersen, og fer eisini at syngja saman við hesum kóri á konsertunum.

Hósdagin 4. apríl stevnir kórið til Keypmannahavnar og hevur tvær konsertir har. Fyrra konsertin er á Amager sama dag í Allehelgens kirke, Ungarsgade 43 kl. 19, og fríggjadagin 5. apríl Kl. 19 hevur kórið sína seinastu konsert á ferðini í Samuelskirkjuni. Kórið vitjar Tritonus og leiðara tess John Høybye.

Í sangkórinum eru 36 sangarar. Solistar eru Anvør Abrahamsen, Linda Toftegård, Daisy Johannesen og Hannis Hansen. Kórleiðari er Frits Johannesen. Klaverfylgisspælið hevur Eyðun á Lakjuni, og orgulfylgisspælið hevur Jóannes Nolsøe. Hann fer eisini at framføra onkra orgulsolo.

# Studentaskúlanæmingar á oljuferð

**Næmingarnir, sum hava oljufrøði í Studentaskúlanum í Hoydølum, eru farnir á námsferð til Skotlands, har ørindini eru at kunna seg um oljuvinnuna í oljuhøvuðsstaðin, Aberdeen**

FERÐ
*Heri á Rógvi*



*Ferðalagið úr Hoydølum, sum er farið til Aberdeen at hyggja nærri at oljuvinnuni. Maðurin uttast til høgru eitur Alan. Hann vísti næmingunum runt á DTL venjingarmiðstøðini.*

*Mynd: Heri*

**Aberdeen:** Á triðja árið í Studentaskúlanum í Hoydølum hava næmingarnir møguleikan at velja oljufrøði. Hetta er ein lærugrein, har næmingarnir fáa høvið til at kunna seg um oljuvinnu. Tað verður nortið við fleiri ymiskar tættir í oljuvinnuni. Tann meiri tekniski parturin, tað meira samfelagsliga eins og jarðfrøðin verður viðgjørd í tímunum. Lærugreinin stílar eftir fevna rættiliga breitt, soleiðis at allir tættir verað tiknir við, soleiðis at næmingar fáa eitt so gott innlit sum gjørligt ta tíðini, teir ganga.

Hetta er triðja árið, ið Studentaskúlin roynir seg við hesari lærugreinini. Næmingarnir fáa onkrar sersømdir í hesari lærugreini, eitt nú fáast bøkurnar fyri einki. Tað var í sambandi við, at oljuvinnan meira og meira vant uppá seg, at farið varð undir at skipað eina oljulærugrein. Tað vóru Heini Eysturoy og Katrin Thomassen, sála, sum tóku stig til at gera lærugreinina, ið ikki er at finna í sama líki nakra aðrastaðni. Lærugreinin er ein sokallað miðstig lærugrein, ið verður boðin út á triðja árið og tímatalið er fðra tímar um vikuna.

Teir sjey næmingarnir, ið hava valt oljufrøði hetta skúlaárið, eru í hesum døgum á námsferð í Skotlandi. Leiðin gekk til Aberdeen, sum er at meta sum ein oljuhøvuðsstaður, har fleiri oljufyritøkur hava nógv av sínum virksemi. Tað nógva av skipaferðsluni í sambandi við oljuvinnuna í Norðsjónum verður eisini umskipað í Aberdeen.

Á ferðini skulu næmingar vitja á ymsum støðum. Farið verður m.a. eitt hyggja nærri at einum oljuboripalli, sum liggur á landi. Eisini verður vitjað hjá Amerada Hess, umframt at tær báðir skúlarnir Robert Gordon University og Aberdeen University fáa vitjan frá teimum forvitnum føroysku næmingunum.

Ferðalagið telir tólv fólk.

Amerada Hess, Mentamálastðrið og Tórshavnar Bðráð hava stuðlað ferðini, og teimum vilja næmingar og lærara takka hjartaliga.



# Kenslurnar eru altíð tær somu

**Alzheimersfelagið er nú av álvara farið undir virksemi sítt. Felagið hevur í vikuni skipað fyri skeiðum um demens, og er føroyska Elsa Zachariasen komin til Føroya úr Danmark at halda skeiðini**



*Elsa Zachariasen hevur vitjað heima í Føroyum her hon hevur havt skeið innan demens, og er tað Alzheimersfelagið, sum hevur skipað fyri*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

DEMENS
*Ingrid Bjarnastein*

Elsa Zachariasen er útbúgvin sjúkrasystir. Sunnudagin hevði hon ein almennan fund um demens, og mánadagin og týsdagin hevði hon tvey fullteknað skeið fyri avvarðandi og øðrum, ið hava áhuga fyri demensi.

– Málbólkurin hjá mær var stórt sæð avvarðandi, sjúkrasystrar og heimahjálparar, sigur Elsa Zachariasen. – Eg leggi stóran dent á at undirvísa í nýggja pleyguháttinum ístaðin fyri tí gamla. Tað verið seg, at sjúkan demens er meira enn bara ein diagnosa, og vit eiga at gera lívsvirðið hjá tí sjúka so gott sum yvirhøvur møguligt meðan tey framvegis eru á lívi.

Eisini varð nomið við evnið at búgva einsamallur heima, og hava demens. Elsa sigur, at tað vísir seg, at meira tey avvarðandi vita um sjúkuna, minni stríð hava tey av hesum, meðan minni tey vita, stinga meira trupulleikar og vansar av tí dementa seg upp.

## Grundin er til staðar

Sjálvt um ein persónur hevur fingið staðfest demens, er týdningarmikið at vita, at grundpersónligheitin er altíð tann sama. Kenslurnar eru eisini tær somu, og tí er tað týdningarmikið

Elsa heldur, at føroyingar hava ein fyrimun við at búgva í einum so lítlum samfelagið. Úti á bygd vóru netverk, sum tú ongantíð hevði kunnað havt í til dømis Keypmannahavn.

– Ein kona fortaldi mær, at fólk í bygdini hon býr í, plagdu at ringja til hennara og siga, at nú var maður hennara á kajini, og nú var hann har. Hetta er eitt netverk, sum heilt vist er til stóran fyrimun, greiðir Elsa frá.

– Stórt sæð er tað ikki nógvur munur á møguleikunum fyri dement í Føroyum og Danmark. Onkustaðni í Danmark eru vit á sama støði, sum her í Føroyum, men tó: onkustaðni eru vit eisini frammanfyri. Í Føroyum er størsti trupulleikin tann, at tað er ringt at passa ein persón, sum hevur demens, tí tú fært ikki nakra hjálp til íbúðir

Sambært Elsu, so er nógv vitan komin innan demens seinastu fýra til fimm árini. Áhugi í samfelagnum er fyri hesum, og tí hevur hetta sett nógva gransking um sjúkuna í verk. Ikki bert heilagranskin, men eisini mátan, sum tey avvarðandi og sjúkrahjálpararnir hugsa uppá.

## Síggja møguleikarnar

– Ein tann týdningarmesti boðskapurin er, at vit eiga at hava positivar væntanir til tann sjúka, um vit hava positivar væntanir, fáa vit ein positivan tanka, og hareftir eina positiva kenslu, sum so botnar í eini positivari gerð. Um vit hugsa negativt, so endar tað sum oftast við einum negativum úrslitið, sum kanska heldur ikki eydnast. Og tá vit eru negativ yvirfyri tí persóninum, sum hevur demens, so skumpa vit hann longur niður sálarliga.

Grundleggjandi er tað ein spurningur um hugburð, vísir Elsa á. Um fólk duga at síggja møguleikarnar, hvat tann dementi kann, ístaðin fyri forðingarnar, so kann tað gera lívið hjá tí sjúka so nógv lættari, og viðkomandi verður eisini lættari at fáast við.

At samskiftið millum tann sjúka og onnur er røtt hevur alt at siga. Orð, kropsmál, tónalag eru grundsteinarnir fyri, at arbeiðið verður lættari at fáast við.

Elsa Zachariasen er væl nøgd við undirtøkuna og móttøkuna av skeiðnum.

– Nógv fólk komu at lurta, og tað eri eg glað fyri. Bæði skeiðini vóru fullteknað. Um eg ætli at koma aftur? Ja, um tørvur er á tí, so komi eg heilt vist aftur. Elsa Zachariasen er útbúgvin sjúkrasystir. Hon hevur arbeitt við demens seinastu fýra árini. Í Brøndby Kommune er hon demens-koordinator, og fyri tveimum árum síðani setti hon á stovn íbúðir, har 18 fólk, sum eru dement búgva, og er hon leiðari fyri hesum íbúðinum. Eisini vitjar hon fólk, sum hava demens heima við hús.

Óhoyrt í bilasøguni
Páskatilboð frá Bilfríðkan

Brúktbilafígging:
bert útgjald
og einans 4% føst renta p.a.

Bert galdandi til páskir

Bilfríðkan
Velbastaðvegur • 110-Tórshavn
Tel. 31 73 00 - 21 73 00